# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sólvit E. Nolsø, løgtingsmaður

**Svarari:** Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

**Evni:** Dalstunnilin

**Spurningar:**

1. Nær verður Dalstunnilin skotin ígjøgnum?
2. Hvørjar eru ætlanirnar við vegunum í Dali og í Húsavík?

**Viðmerkingar:**

Pengar vórðu settir av til at skjóta Dalstunnilin ígjøgnum í ár og gleðiligt at síggja, at byrjað er uppá tunnilin í Dali. Komið er í seinasta enda av árinum, og tí er áhugavert at fáa at vita, um tíðarætlanin heldur, og tunnilin verður skotin ígjøgnum í ár.

Eitt annað, sum fleiri hava spurt um, eru vegirnar til tunnilsmunnarnar í Dali og í Húsavík. Nøgdin av gróti, sum kemur úr ein slíkum tunli, er stór, og upplagt er at hugsa, at tað m.a. verður brúkt at breiðka vegir í Dali og í Húsavík, so høgligari verður at koyra til tunlarnar.

**Á Løgtingi, 25. september 2023**

Sólvit E. Nolsø